Toll- og Skattstova Føroya

# Starv innan eftirlit

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum. Uppgávur stovnsins eru m.a. at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- , avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m., eins og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur umleið 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík, røkja raksturin.

Í Virkiseftirlits- og innheintingardeildini í Streymoyoar Øki starvast eini 17 fólk.

Lýsingin sæst eisini á heimasíðu okkara www.tollskatt.fo

E-mail: streymoy@tollskatt.fo

Á Streymoyar øki er eitt starv leyst at søkja til setan 1. januar 2005, ella so skjótt til ber.

**Høvuðsuppgávur**
Útgangandi eftirlitsarbeiði og málsviðgerð innan meirvirðisgjald, skatt og toll, herundir at geva ummælir í møguligum kærumálum.

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður, skal hava roknskaparligan førleika, so sum Cand. merc., HA, HD ella líknandi útbúgving. Viðkomandi skal hava góð samstarvsevni, vera fyrikomandi og arbeiðssamur/som og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunnu bjóða**
- Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi
- Klokkuskipan við flextíð
- Eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi

**Setanartreytir**
Lønar- og setanarviðurskifti, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

**Setanarøki**
Setanarøkið umfatar aðalstýrini, Løgmansskrivstovuna og deildir teirra.

**Nærri frágreiðing um starvið**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Hallbjørg Hansen á tlf. 310260, lokal 108.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi

**28. desember 2004 kl. 12.00**

**Toll- og Skattstova Føroya**
Streymoyar Øki
Smyrilsvegur 7
Postsmoga 3139
110 Tórshavn

Toll- og Skattstova Føroya

# Avloysari fyri deildarleiðara í eftirliti og innkrevjing

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum. Uppgávur stovnsins eru m.a. at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta-, avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m., eins og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur umleið 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík, røkja raksturin.

Á Virkiseftirlits- og innheintingardeildini á Streymoyar Øki starvast eini 17 fólk.

Lýsingin sæst eisini á heimasíðu okkara www.tollskatt.fo

E-mail: streymoy@tollskatt.fo

Vegna farloyvi verður søkt eftir einum avloysara fyri deildarleiðaran á virkiseftirlitinum og innkrevjingini í Streymoyar Øki í tíðini 1. februar 2005 til 31. januar 2006.

**Høvuðsuppgávur**
At vera leiðari fyri eftirlits- og innheintingardeildini, sum umsitur virkiseftirlit og innheinting av almennari skuld.

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður, skal hava roknskaparligan førleika, so sum Cand. merc., HA, HD ella líknandi útbúgving frá hægri lærustovni. Viðkomandi skal hava góð leiðslu- og samstarvsevni, vera fyrikomandi og arbeiðssamur/som.

**Vit kunnu bjóða**
- Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi.
- Klokkuskipan við flextíð.
- Eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir**
Lønar- og setanarviðurskifti, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

**Setanarøki**
Setanarøkið umfatar aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir teirra.

**Nærri frágreiðing um starvið**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til økisstjóran á Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki tlf. 310260.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um starvsroyndir, skal vera Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi.

**28. desember 2004**

**Toll- og Skattstova Føroya**
Streymoyar Øki
Smyrilsvegur 7
Postsmoga 3139
110 Tórshavn

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Frítíðarskúlin Stoffalág 60**

Í Frítíðarskúlanum ganga 67 børn, 20 børn fyrrapart og 47 børn seinnapart.

## Barnaansingin í Tórshavnar Kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Frítíðarskúlan Stoffalág 60 eftir:**
- einum pedagogi, fyri pedagog í fer í farloyvi, at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 3. januar 2005 ella eftir nærri avtalu. Farloyvistíðin er frá 01.01.05 til 31.01.06. Arbeiðstíðin er millum kl. 07:30 og 17:00.

Um pedagogur ikki søkir, verður hjálparfólk sett .
Pedagoglesandi, ið verða liðug í februar, eru vælkomin at søkja.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Mariu Heinesen, leiðara, tlf. 314364 / 214364

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Frítíðarskúlanum Stoffalág 60, Postboks 3316, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 20. desember 2004.

- onnur leys størv?
Hygg á
www.torshavn.fo

Vísti tú ikki tað? Sosialurin

SOSIALURIN
Síðsta blaðið fyri jól, kemur út 24. desember
Freistin at koma við lýsingum fyri jól er:
Størri lýsingar, ella litlýsingar: 20. desember kl. 15.00
Smærri tekstlýsingar: 21. desember kl. 10.00

Sosialurin | ARGJAVEGUR 26 · P.O.BOX 76 · FO-110 TÓRSHAVN · TEL 34 18 00
FAX 34 18 01 · POST@SOSIALURIN.FO · WWW SOSIALURIN.FO